# Undir Vestmannasund fyri sama prís

*Tú sleppur undan ferjugjaldinum, men fyri á leið sama prís kanst tú koyra teir seks minuttirnar undir Vestmannasundi av Fútakletti og til Leynar*

DIA MIDJORD

– Vit kenna ikki endaliga prísin, men rokna við einum gjaldi, ið svarar til kostnaðin at koma tvørtur um Vestmannasund í dag, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í p/f Vágatunlinum.

Og skal p/f Vágatunnilin megna at gjalda øllum sítt, so skulu helst eini 300 til 400 akfør brúka tunnilin hvønn dag. P/f Vágatunnilin metir, at um tíggju ár brúka 1000 akfør tunnilin dagliga.

Hvussu verður og ikki, tað verður ómaksleysari at sleppa oyggj úr oyggj. Túrurin av flogvøllinum til Havnar tekur væl minni enn ein tíma.

**Líkur kollfjarðatunlinum**

Vágatunnilin verður 4,9 kilometrar langur. Hann fer inn í bergið við Leynar og kemur upp beint sunnan fyri Fútaklett í Vágunum.

– Tú hoyrir útvarpið og kanst práta í fartelefon allan vegin, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í p/f Vágatunlinum.

Á tíðindafundinum greiddi hann frá fasta sambandinum um Vestmannasund, har tunnilin verður líkur tí í Kollafirði við tveimum koyribreytum á 3,5 metrar. Tunnilin er upplýstur alt samdøgrið.

**Einki óvanligt**

Tú koyrir oman gjøgnum tunnilin frá Vágoynni og niðan gjøgnum tunnilin til Streymoynna. Hallið báðumegin er 7 metrar fyri hvørjar 100 metrar.

– Hetta er ikki so bratt. Í Noregi eru nakrir tunlar, ið hava sama hall, sigur Niels Larsen, økisstjóri hjá NCC Danmark, ið skal standa fyri tunnilsgerðini.

Tunnilin hevur neyðparkering til persónbilar fyri hvørjar 450 metrar, og til lastbilar eru trý vendipláss í tunlinum. 250 metrar eru millum eldsløkkiútgerðina, meðan 500 metrar eru millum neyðtelefonirnar.

Tunnilin liggur meir enn tjúgu metrar undir havbotninum. Frá havskorpuni eru 105 metrar niður á lægsta punkt.

*Dávid Reinert Hansen, stjóri, greiðir frá fasta sambandinum um Vestmannasund*

**Klárur á sumri 2003**

Vágatunnilin skal ætlandi verða klárur at taka ímóti almennari ferðslu á sumri í 2003. Men tað verður longu móti endanum av komandi ári, at sjálv tunnilsgerðin verður liðug.

Síðani skal eitt nú pumpustøð fáast upp á pláss, koyribreytir skulu gerast klárar og el skal leggjast inn. Frá nýggjárinum og fram móti sumri í 2003 skal riggast av og seinasta hond leggjast á verki.

Á Vágalandinum skal gerast vegastrekkið á tveir kilometrar frá tunnilsmunnanum og fast í landsvegin. Her skal eisini brúgv gerast. Streymoyarmegin skal umframt brúgv gerast ein lítil tilkoyring til tunnilsmunnan.

## Undirskrivaðu á Hafnia í gjár

*Seinnapartin í gjár undirskrivaðu umboð fyri p/f Vágatunnilin og NCC Vága konsortiið sáttmálan um tunnilsgerð*

*Teir hava undirskrivað sáttmálan um fígging*

DIA MIDJORD

Klæmint Weihe, nevndarformaður og Dávid Reinert Hansen, stjóri, bundu seg seinnapartin í gjár at gjalda 168 milliónir krónur til NCC konsortiið, ið er samansett av NCC Danmark og NCC Noregi.

Kortini skal hetta ikki gjaldast úr egnum lumma. P/f Vágatunnilin hevur fingið fíggjað 150 milliónir av hesum úr Ílegginingargrunninum fyri Føroyar. Hesin sáttmálin varð undirskrivaður á Hafnia um somu tíð.

Umframt at undirskriva hesar báðar sáttmálar, so kunngjørdi nevndarformaðurin Klæmint Weihe, at p/f Vágatunnilin hevði avgjørt at taka av tilboði frá J. K. Petersen upp á vegagerð fyri 23,3 milliónir.

**Byrja 5. september**

– Eigaraviðurskiftini í Vágum eru ikki komin heilt undir land, men hetta kemur ikki at darva arbeiðnum, sigur Klæmint Weihe.

– Arbeiðið skal byrja 5. september. Vit hava lagt okkum eftir at fáa so stóra føroyska luttøku í arbeiðnum sum gjørligt og tað meta vit, at vit hava fingið, sigur nevndarformaðurin.

Hann leggur aftrat, at nevndin í p/f Vágatunlinum heldur tað hava avgjørdan týdning, at byggiharrin átekur sær so stóra ábyrgd sum møguligt í sambandi við tunnilsgerðina.

– Tí valdu vit at góðtaka tilboðið á 168 milliónir frá NCC, heldur enn eitt bíligari tilboð á 151 milliónir frá sama byggiharra.

# Byggirisi stendur fyri Vágatunlinum

*NCC Norge hevur gjørt fleiri enn 20 tunlar og hevur stutt síðan lagt seinastu hond á ein 7 kilometra langan undirsjóvartunnil í Noregi*

DIA MIDJORD

Tað er ikki hvør sum helst, ið skal gera fyrsta føroyska undirsjóvartunnilin. NCC Norge og NCC Danmark hava sligið seg saman og hava lovað at gera tunnilin fyri 168 milliónir krónur.

Samlaði umsetningurin fyri NCC, ið stendur fyri Nordic Construction Company, er einar 40 milliardir krónur um árið. Út frá hesum er tað ikki so nógv, at NCC fær góðar 34 túsund krónur fyri hvønn av teimum 4900 metrunum, ið boraðir verða undir Vestmannasundi.

NCC Norge stendur fyri sjálvari tunnilsgerðini, meðan NCC Danmark tekur sær meira av samskipan og umsiting. NCC Norge hevur drúgvar royndir við fleiri enn tjúgu tunnilsgerðum, og fyri kortum varð seinasta hond løgd á ein 7 kilometra langan, norskan undirsjóvartunnil. Og NCC Norge hevur eisini gjørt heimsins longsta vegtunnil.

**Verður tættur**

Økisstjórin hjá NCC Danmark, Niels Larsen, lovar føroyingum ein tættan tunnil fyri tær 168 milliónirnar.

– Uppruna tilboð okkara var upp á 151 milliónir, men vit hava fyri 17 milliónir aftrat átikið okkum størri ábyrgd at fáa tunnilin tættan, sigur Niels Larsen.

Sjálvandi kann ein undirsjóvartunnil ikki gerast heilt tættur. Tað letur seg nevniliga ikki gera. Men hvat um Vágatunnilin lekur meir enn teir 300 litrarnar pr. kilometur um minuttin.

– Tað verður okkara trupulleiki, sigur økisstjórin hjá NCC og leggur aftrat, at allur sjógvurin verður samlaður í ein tanga undir tunlinum og verður so hvørt pumpaður útaftur.

**Krevur handahógv**

Tað er ikki bara sum at siga tað, tá ein skal í holt við ein undirsjóvartunnil. Og tað hevur sanniliga nógv at siga, at man hevur roynt slíkt arbeiði áður.

Vit spyrja tí Niels Larsen, hvat er tað torførasta í einum slíkum arbeiði.

– Tað er sjálv spreingingin inni í holinum. Henda má ikki verða ov veik, eiheldur ov sterk. Spreingjast skal við serligum handahógvi, tí gróti skal rapa niður og eitt sindur út. Og nødgirnar skulu vera soleiðis, at tær skjótt og lætt kunnu koyrast vekk, so ein kann spreingja víðari, sigur Niels Larsen.

*Niels Larsen, økisstjóri hjá NCC Danmark, lovar, at tað skal verða turt at koyra ígjøgnum Vágatunnilin*



# Studentaskúlin fyri vanbýti

*Studentaskúlin í Hoydølum fær nærum einki til viðlíkahald, tí ein nýggjur skúli skal gerast. Kortini verður hesin skúlin ikki bygdur tey næstu tíggju árini*

DIA MIDJORD

Í fleiri ár hevur studentaskúlin í Hoydølum verið fyri vanbýti. Síðan tað kom fram í 1997, at nýggjur skúli skuldi byggjast í Marknagili, hava politikararnir treyðugt sett pening av til skúlan.

– Ein trupulleiki hjá okkum er, at skúlin seinastu árini ikki hevur fingið pening til viðlíkahald, tí ført verður fram, at vit fáa ein nýggjan skúla. Men henda ætlanin verður so hvørt útsett, sigur Jóhann Hendrik Dahl, inspektørur og vararektari á studentaskúlanum í Hoydølum.

– Skúlin er niðurslitin og líkur slettis ikki nútímans krøv. Tað er bert ein spurningur um tíð, so brennir alt saman, sigur hann.

**Long bíðitíð**

Sambært nýggju verklagsætlanini hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum, so verður ætlanin at seta pening av fryst í nøkur ár. Og áður hevur verið frammi, at byggingin av nýggjum skúlamiðdepli fór at taka eini 7 ár.

Sostatt skulu nógvar pisur úr reiðrinum í Hoydølum, áðrenn nýggi skúlin stendur liðugur.

– Skulu vit verða verandi í Hoydølum tey næstu tíggju ella tólv árini, so mugu vit hava fitt av peningi til viðlíkahald og ikki minst til útbygging á staðnum, sigur Jóhann Hendrik Dahl.

Vararektarin leggur aftrat, at talan verður ikki um eina bíliga loysn, tí gamlir bygningar kosta nógv at gera í stand.

**Skuffaðir**

Jóhann Hendrik Dahl sigur seg væl skilja, at man ikki vil yvirupphita búskapin.

– Men tað er eisini nakað sum eitir tørvur, og hesin má nøktast, sigur vararektarin og leggur aftrat, at tey í Hoydølum gerast ómetaliga hørm, um ætlanin einaferð enn verður útsett.

Studentaskúlin í Hoydølum er elligamal. Serstovurnar eru gjørdar til eina gamla skipan við ávísum næmingatali.

– Í dag er alt broytt. Vit hava nógv fleiri næmingar og krøvini til undirvísingina vaksa og broytast støðugt. Tað er risastórur tørvur á serstovum. Vit mugu hava ein nýggjan skúla, so einfalt er tað, sigur vararektarin í Hoydølum.

– Fáa vit ikki nýggja skúlan innan eina rímiliga tíð, so skramblar alt saman, leggur hann aftrat.

## Tríggjar nýggjar bøkur frá Bókadeildini

*Bókadeildin*
*Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tríggjar bøkur:*
*Smábarnabókina NERT OG FØL HVØLPIN*
*Myndabókina KARL ER TÁNNLEYSUR*
*Barnabókina KNASSI*

Nert og føl hvølpin

Hendan bókin er ætlað teimum smæstu, sum dáma væl at handfara alt og kanna, hvussu alt kennist. Bókin er úr haldgóðum pappi, og á hvørjari síðu eru fittir hundahvølpar.

Børnini sleppa at kína mjúka hvølpinum, spæla við lodnu oyrini, kráma bláa innisskógvin, ið hvølpurin jaglar, føla reyða gummiboltin og nema við leðurkenda snútan.

Pauli Hansen týddi Nert og føl hvølpin, sum er 12 síður í litum og kostar kr. 49. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

**Karl er tannleysur** eftir Aage Brandt & Mette–Kristine Bak

Karl hevur fingið eina leysa tonn, og mamma og pápin vilja fegin hjálpa Karli, at taka tonnina úr munninum. Men so koma sjórænararnir, og hin ræðuligi Karl Tøkutonn stendur við lúnningina og sveiggjar ógvusliga svørði sínum…

Leysa tonnin fær rættuliga ferð á hugflogið hjá Karli, og mamman og pápin eru púra sjúk eftir at sleppa at taka tonnina hjá honum. Til alla lukku eru omman og abbin á vitjan, og tey eru í parti við Karli. Og so avdúkar abbin, at tá ið tað ræður um leysar tenn, er tað ringt at kappast við hann… Hetta er tríðja myndabókin um Karl. Áður hava vit verið saman við honum í barnagarðinum, tá ið hann datt og fekk hol á høvdið. Og so fekk hann ilt í oyruni og mátti verða heima eina heila viku. Ella Smith Clementsen týðir bøkurnar um Karl. Karl er tannleysur er 28 síður í litum við stívari permu og kostar kr. 95. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

**Knassi** eftir Sterlig North. Jens Pauli Heinesen týddi. Hugtakandi søga um ein tólvára gamlan drong og besta vin hansara – tomu vaskibjørnina Knassa. Vit eru saman við teimum, tá ið teir reika um í oyðimørkini í Wisconsin og uppliva mangt spennandi og forvitnisligt. Eisini hoyra vit um ymiskt, ið pápin og drongurin havast at heima á garðinum. Mamman er deyð, og eldri systkini eru flutt heimanifrá, so drongurin, Sterling, ger sum honum lýstir, tí pápin er ofta burtur í handilsørindum.

Søgan um drongin, pápan og Knassan, sum gjørdi Sterling North heimskendan, er avbera væl skrivað og hugtekur lesarar í øllum aldri. Bókin er eisini gjørd til film.

Knassi er 192 síður og kostar kr. 130. Bókin er umbrotin, prentað og heft á Einars Prent




Mini Cruise til Bergens
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Á ferðini verður m.a. skipað fyri Bingo
BINGO
úr bara 600,-
www.smyril-line.fo
e-mail: booking@smyril-line.fo